# 60 bátar í átta ár

**Tað byrjaði av tilvild fyri 12 árum síðani. Tá smíðaði Sámal Hansen eitt 10-mannafar til sín sjálvan. Í dag hevur hann smíðað nærum allar bátarnar, sum fara at rógva kapp í summar. - Og tað er framvegis langur bíðilisti, sigur stilli bátasmiðurin í Runavík**



*Umframt allar teir 60 bátar til føroyska kappróðurin hevur Sámal Hansen smíðað eisini smíðað bátar til Hafnafjørðin og Vestmannaoyggjarnar í Íslandi, har teir somuleiðis eru byrjað at rógva við føroyskum bátum*

HANDVERK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Runavík**: - Tað vóru helst tey góðu úrslitini hjá Eysturoyingi, sum gjørdu sítt til at feløgini byrjaðu at venda sær til mín, sigur Sámal Hansen við Sosialin.

Í kjallara sínum á Nýggjavegi í Runavík er ferð á bátasmíðinum. So skjótt sum tann eini báturin er liðugur, fer hann undir tann næsta.

- Tað vísir seg, at fólk hava dámað væl bátarnar sum eg havi smíðað. Tey hava helst sæð, at ein hevur betri kjans at vinna ein róður við einum nýggjum báti.

- Hetta hevur so aftur givið mær so nógv arbeiði, at eg eitt skifti hevði arbeiði tvey ár fram í tíðina, sigur hann og kann líta aftur á 60 kappróðrarbátar, sum eru latnir úr hansara hondum.

Tað tekur fimm vikur at byggja ein minni bát og seks vikur at byggja eitt 10-mannafar, tá ein slíkur sum Sámal fremur handverk sítt.

Í løtuni er hann í ferð við at smíða 10-mannafarið "Ormurin Langi" til róðrarfelagið Knørrur í Havn. Hetta arbeiðið er um at verða liðugt.

Men so standa 10 aðrir eisini á bíðilista!

## Nú er liðugt

Nú Sámal hevur smíðað allan henda stóra flotan av bátum, kann sigast at hann kennir rættiliga nógv til kappróður - fyrst og fremst sum bátasmiður, men eisini sum íðin kapprógvari.

Fyrstu ferð hann fór í ein kappróðrarbát var í 1985, tá hann róði fyrsta árið við Tjaldrinum hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ. Eftir tað gjørdu teir ikki mætari enn at manna Eysturoying.

- Hann hevði tá ikki róð í fleiri ár, og vit hildu tað vera uppá sítt pláss, at hann aftur fór at kappast við hinar, sigur Sámal við einum brosi.

Tá so tann nýggi Eysturoyingur kom í 1998 var sjálvsagt, at Sámal var ein manningini tey næstu árini á bátinum, sum gjørdist FM-vinnari hetta árið og seks ferðir íalt, seinast í fjør. Eftir ein lítlan steðg, var hann aftur við bátinum í fjør, hesaferð sum róðursmaður.

- Men í summar verði eg ikki við. Nú er liðugt, sigur Sámal.

Hann hevur tó ikki heilt slept kappróðrinum. Sámal er í dag ein av nevndarlimunum í kappróðrarfelagnum.

- Kappróður hevur altíð havt mín áhuga, og tað kemur hann framvegis at hava, slær hann fast.

## Altíð galið við bátinum

Sámal telist í dag millum royndar rógvarar. Hann hevur róð mangan teinin á føroysku firðunum, men hann hevur eisini róð við ymiskum bátum.

Ein natúrligur spurningur til hansara er tí tann, um nakar munur er á teimum ymisku bátunum? Og hvussu ber tað til, at tveir bátar ikki koma á mál samstundis, hóast manningini hevur eins styrki og førleika?

> *Hugurin at smíða bátar er als ikki tann sami nú sum áður. Eg havi hug at royna nakað annað*

Tey fyrstu árini róði Sámal við Tjaldrinum og fór síðani at rógva við Eysturoyingi. Úrslitini vóru so nøkulunda og teir vunnu onkra stevnu. Men fyri ein maskinsmið sum Sámal skapti hetta ein áhuga eftir at vita, hvussu bátarnir sjálvir vóru smíðaðir.

- Tú veitst hvussu tað er: Tað er sjáldan galið við manningini. Tað er altíð báturin sum fær skuldina fyri tey vánaligu úrslitini!

Við spurninginum um og forvitninum í, hvussu bátarnir vóru smíðaðir, fekk hann brádliga eyguni upp fyri, at teir vóru langt frá eins.

Hann sá líkasum nøkur felags eyðkenni í teimum bátunum sum gingu væl og vunnu nógv.

## Longd og breidd

At byrja við hugdi hann rættiliga nágreiniliga eftir teimum bátunum sum kendi bátasmiðurin Niklas í Koltri hevði bygt. Út frá hesum gjørdi hann sær síðani egnar metingar um snið og smíð.

Eitt týdningarmikið eyðkenni var, at ein bátur skal vera smidigur aftan fyri at sleppa vatninum væl, eins og neyðugt er at stokkarnir koma út til ta fullu breiddina sum Róðrarsambandið loyvir.

- Eitt annað avgerandi punkt er longdin á bátinum. Fyri mær varð púra greitt, at tað vóru teir longru bátarnir sum gingu best.

- Ja, tað vísti seg at summir bátar altíð vunnu. Og so var næstan líkamikið um teir skiftu fólk ella ikki, sigur Sámal, sum í sínum handverki hevur lagt seg eftir at hava hesi eyðkennini við.

## Bátasmiður av tilvild

Tað sum kanska kann undra mong er, at Sámal als ikki er útbúgvin ella lærdur sum bátasmiður. Hann er maskinsmiður og lærdi í síni tíð í smiðjuni hjá Mekanik.

At hann so í dag hevur bygt allar hesar 60 kappróðrarbátarnar, hendi so at siga av tilvild ein dagin fyri 12 árum síðani.

Hetta var als ikki nakað sum hann hevði lagt ætlanir um!

Stóri áhugi hansara fyri kappróðri fekk hann at byggja sín egna bát í 1996. Hann æt tá Kjølur, men eitur í dag Vágbingur. Hetta fyrsta árið varð hann tó mannaður við kollfirðingum.

- Tað vísti seg, at teir kláraðu seg so mikið væl í róðrunum, at tað vóru fleiri sum hildu, at báturin sjálvur hevði sína stóru ávirkan á tey góðu úrslitini.

- Eg veit ikki, men hetta førdi so við sær, at eg fekk fleiri bíleggingar av bátum - ja, so nógvar, at eg nøkur ár seinni hevði ein langan ordraseðil av bátum, sigur Sámal.

## Ein út - tann næsti inn

Stóri eftirspurningurin førdi aftur við sær, at hann fyri átta árum síðani gavst at arbeiða hjá Mekanik eitt skifti fyri at smíða kappróðrarbátar burturav, fyri at stytta ordraseðilin.

Úrslitið varð kortini júst hitt øvugta: Nú komu bíleggingarnar streymandi inn!

- Listin gjørdist so langur, at eg fór at gera hetta burturav. Men eg veit líka, - tað er altíð onkur bátur á bíðilista.

- Hetta 10-mannafarið fer út í hesi vikuni, og longu í næstu viku byrji eg uppá tann næsta sum skal til Sandavágs. Og tann triði báturin skal helst verða klárur einaferð mitt í kappingini í summar.

- So tú sært, at her er ríkiligt at gera hjá einum manni, sigur Sámal.